# Tvær eldsálir heiðraðar á Javna-veitsluni



*Diana og Finn í Puntabyrgi fingu ársins herðaklapp frá Javna, har síggjast tey beint eftir at heiðurbræv er handað, saman við børnunum Ann og Tóri*

**Seinasta fríggjakvøld helt Javni 35 ára stovningardagin á Hotel Tórshavn. Á samkomuni vórðu Diana og Finn í Puntabyrgi heiðrað fyri tað slóðbrótandi arbeiði, tey hava gjørt fyri at betra umstøðurnar hjá fólki við menningartarni**

JAVNI

Í samband við 35 ára stovningardagin hjá Javna 14. mai hevur felagið seinastu vikurnar roynt at varpað ljós á umstøðurnar hjá fólki við menningartarni. Í sjónvarpinum og bløðum hevur ein røð av lýsingum verið at sæð, har ymisk fólk við menningartarni hava sagt frá sínum lívi og ynskum fyri framtíðini, eisini hava fundir verið fyriskipaðir, sum á ymiskan hátt skulu verða við til at betra umstøðurnar hjá fólki við menningartarni.

Endabrakið á 35 ára hátíðarhaldinum var síðsta fríggjakvøld, tá eini 300 veitsluklødd fólk í øllum aldri hittist til føðingardagsveitslu á Hotel Tórshavn. Millum gestirnar var bæði løgmaður og og landsstýrismaðurin í almannamálum. Veitslan var sum allar javna-veitslur sera góð og øll hugnaðu sær ófört.

Á veitsluni spældi m. a. Ælabogin, og tað var ein fragd at síggja tey í teirra nýggju búnum, ið vóru liðugt seymaðir dagin fyri veitsluna. Ælabogin hevði vant dúliga seinastu dagarnar upp undir veitsluna, og hetta hoyrdist á framførsluni, sum var avbera góð. Ælabogin fer seinni í summar á konsertferð til Noregs.

Á hvørjum ári letur Javni ein viðurkenning til tann ella tey sum á einhvønn hátt hava gjørt okkurt serstakt fyri tey við menningartarni. Á veitsluni var ársins herðaklapp latið til Dianu og Finn í Puntabyrgi fyri tað slóðbrótandi arbeiði, tey hava gjørt í javna-høpi fyri betra um umstøðurnar hjá fólki við mennignartarni.

Herðaklappið verður altíð latið við einum brotið úr yrkingini Barnið, bergið og blómurnar hjá Karsten Hoydal:

*Sortugrøs og hjálpirót*
*út av torvu hanga,*
*Fagrast eru blómurnar*
*Har ringast er at ganga*

Forkvinnan í Javna, Lis Eklund í Niðristovu, segði m. a. hetta tá heiðursbræv og gáva varð handað Dianu og Finni:

»Við ágrýtni, eldhuga og toli, við eymleika og kærleika hava tit ósjálvsøkið stríðst fyri betri korum til fólk við menningartarni.

Tann, ið fer til bjarga, má vita, at álitismaður situr við endan uppi á eggini. Soleiðis kenna vit tykkum, Dianu og Finn. Mangar fagrar blómur hava tit vunnið Javna, hóast ofta hevur verið illgongt.«

Eftir borðhaldið spældi M’as Blues Band til dans, og har vóru bæði gamlir M’as Blues Band slagarar og nýggir sangir, sum vit uttan iva fara at hoyra meira til í framtíðini.

Og soleiðis kom M´as Blues Band at eiga seinastu tónarnar í 35 ára hátíðarheldinum hjá Javna.



*Jonhard, Mortan og Rói úr Ælaboganum á veg inn á pallin at spæla í nýggjum búnum.*



*Sum altíð setti M’as Blues Band futt í veitsluna*




FJM Runavík søkir eftir skrivstovunæmingi

Hevur tú hug at koma í skrivstovulæru hjá FJM Runavík?

Vit ynskja, at tú hevur miðnámsútbúgving ella viðkomandi arbeiðsroyndir og at tú:

- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Dugir mál (føroyskt, norðurlendskt og enskt)
- Hevur góðan telduførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision er ein fyrimunur.

Tú kemur at starvast á skrivstovuni í Runavík. Í lærutíðini kemur tú at nema kunnleika innan alt vanligt skrivstovuarbeiði, t.d. bókhald, lønarumsiting, tollavgreiðslu og ymiskar fyrisitingaruppgávur. Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir lokna lærutíð.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

FJM Runavík
Postboks 192
620 Runavík

Att.: Frithleif Olsen

í seinasta lagi tann 7. juni 2006.

Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Kaysten Rasmussen á telefon 30 11 90.

FJM RUNAVÍK

FJM Runavík
Fjøruvegur
Postboks 192
620 Runavík

Tel +298 30 11 90
Fax +298 30 11 91
fjm@faroeyard.fo
www.faroeyard.fo

*FJM Runavík er ein deild av P/F Tórshavnar Skipasmiðju-samtakinum. Í samtakinum starvast um 300 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur fevna um stál, aluminium, timbur, máling, beding, mekaniskar tænastur, tekniska ráðgeving og beinleiðis søla.*